Sosialinum. Sjálvur var hann staddur har afturi á skipunum, tá ið tað brast. Hann var alla tíðina ræddur fyri, at skipið fór at koppa, tí aldan lá beint inn á síðuna.

Kaj minnist skiparan sum ein fittan og raskan mann, og fyri hann, sum fyri allar hinar, var tað ein hvøkkur, at skiparin skuldi farast.

Kaj fór beinanvegin til skips aftur, og tá fór hann við Gerpi, har Birgir Sigurðsson tá var stýrimaður.

## Bjargaði fjarritaranum

Hjalmar Olsen var eisini við til minningarhaldið. Hann var ein av teimum 14 føroyingunum, sum Goðanes var komin heim eftir, og sum bíðaði eftir, at skipið skuldi koma eftir teimum.

Hjalmar var eisini við í bjargingararbeiðinum umborð á einum av teimum smáu bátunum á leiðini. Hann greiðir frá, at tá ið seks mans vóru eftir umborð, brotnaði Goðanes um tvøran, og teir, sum eftir vóru umborð, lupu í havið. Teir komu rekandi eftir eini linju og vórðu tiknir upp av tveimum bátum. Annar báturin var tann, sum Hjalmar var við. Teir tóku tveir mans upp, og annar av teimum var fjarritarin, sum var seinasti maður av skipinum í lívi, og hin var føroyingurin Andreas Hilduberg. Ein annar bátur tók hinar tríggjar. Einki sást til skiparan, men tað sigst, at hann hevði als ikki bjargingarbelti. Sítt egna belti hevði hann latið einum øðrum av manningini, sum einki belti hevði.

Hjalmar sigur, at tað var í tankunum, um tað hevði borið til at lagt at Goðanes við einum deksbáti, so menninir kundu koma beinleiðis av skipinum umborð. Men tað kann bert vera spekulatiónir, um hetta hevði verið nøkur loysn.

Jacob Davidsen búði í Æðuvík tá, hann var eisini ein av teimum, sum bíðaðu eftir at koma umborð. Hann sá úr Æðuvík Goðanes fara suður eftir á veg inn á Skálafjørðin, so hann gjørdi seg beinanvegin kláran at fara umborð. Hann var staddur á Toftum, og hann sá so frægt, sum tað kundi síggjast í myrkrinum, at Goðanes sigldi á Flesjarnar. Hann saman við øðrum fór beinanvegin umborð á ein deksbát, teir fóru yvir til Goðanes, men tað var ikki nøgv teir sum so kundu gera, og teir fóru aftur í havn.

Jacob fór beinanvegin aftur til Íslands. Hann kom at sigla saman við fasta skiparan á Goðanes, sum var heima lagnutúrin. Fyrst vóru teir við einum trolbáti, síðan fóru teir við trolaranum Brimnes.

Hilmar Kass var við Sjófarinum, sum var ein 40-tonsari. Hilmar tekur til, hvussu stóran innsats teir smærru bátarnir gjørdu. Teir kundu jú taka menninar úr bjargingarstólunum so hvørt, og lætti hetta nøgv um bjargingararbeiðið. Hilmar minnist eina ferð hann sá ljós á brúnni, og hetta var í somu løtu, sum skipið brotnaði.

Annars taka fólk á uttara arminum á Skálafjørðinum til, hvussu væl tey minnast hesa hending. Á Strondum kundu nøgv standa í vindeyganum og



*Akkerið, sum er bjargað úr Goðanes*



*Hetta er ein av hurðunum, sum Havnar Froskmannafelag hevur bjargað úr vrakinum á Goðanes*



*Birgir, beiggi skiparan, dóttir hansara Helen og Kristinn, sonur skiparan*



*F.v. Hjalmar Olsen, Kaj Johannesen og Jacob Davidsen. Meðan Kaj var umborð bíðaðu Hjalmar og Jacob eftir at sleppa umborð*

fylgja við bjargingararbeiðinum, og tey kundu hoyra hvussu skipini tosaðu sínámillum.

Við til minningarhaldið vóru eisini aðrir, sum frammanundan høvdu verið við Goðanes. Ein av hesum var 95 ára gamli Dávur í Tjørnuvík. Ein annar var Rudolf á Selatrað.

## Minningarhaldið

Sjálvt minningarhaldið var hátíðarligt, og tað gekk fyri seg á íslendskum við Hera Joensen presti, sum hevur lisið í Íslandi og annars eisini hevur íslendska konu.

Í stuttari røðu vísti hann á lagnufelagsskapin hjá íslendingum og føroyingum, har báðar tjóðirnar hava livað av tí, sum havið gevur, og sum eisini máttu lata, tá ið havið tók.

Minnissteinurin varð avdúkaður av soni og beiggja skiparan, og aftaná vóru blómur lagdar.

Seinast takkaði Karl Johann Birgisson vegna íslendsku luttakararnar fyri luttøkuna.

Tað kom týðuliga fram undir minningarhaldinum, at íslendingarnir eru fegnir um, at teir nú hava eitt stað, har familjan kann minnst Petur, og sum teir kunnu koma aftur til.

Hetta er sama kensla, sum føroyingar hava havt, tá ið teir hava verið í tilsvarandi ørindum í Íslandi.

Aftaná løtuna við minnisvarðan varð boðið til ein drekkamunn í missiónshúsinum á Strondum, har sjómanskvinnuringurin skipaði fyri.

## Akker og hurðar av Goðanes

Mikudagin vitjaði íslendska ferðalagið Froskmannafelagið, sum hevur í varðveitslu tvær hurðar av Goðanes, sum kavarar hava bjargað. Birgir helt heilt vist, at onnur hurðin var av brúnni. Heri Andreassen hevur verið við at kava niður til vrakið. Hann sigur, at tað er nærum einki eftir av tí.

Sagt hevur verið, at akkerið, sum liggur beint yvirav gamla Sjómansheiminim skal vera av Goðanes. Ivi hevur verið reistur, um hetta er so. Men søgan hjá Edvard Kjeld er tann, at hann sjálvur fyrst í 1980-unum tók akkerið upp úr vrakinum av Goðanes. Hetta hevur verið eitt eykaakker, sum lá undir bakkanum. Stokkurin var úrtikin, so akkerið skuldi fylla sum minst. Hann er so settur í, soleiðis sum akkerið sæst á grundini hjá Perluni. Hetta akker sá ferðalagið eisini.

Tað fekk eisini høvi til at síggja Thorshavn, sum var eitt av teimum skipum, sum var við í bjargingini.

## Bjargingingarfeløg stovnað

Vanlukkan við Goðanes sannførdi øll í Føroyum um, at vit vóru sera illa tilbúgvin, tá ið ein slík vanlukka hendi. Her mátti okkurt gerast, tað varð eisini gjørt beinanvegin. Frá íslendska bjargingarfelagnum fekst sum gáva til Føroya Fiskimannafelag ein fullfíggjað bjargingarútgerð.

Tann 30. januar skipaði Landsfelagskapurin Fiskivinnuni til Frama fyri fyrsta fundinum at fyrireika eitt bjargingarfelag. Til staðar vóru Jákup í Jákupsstovu, skrivari í FF, Jóannes Rasmussen, jarðfrøðingur, Jóhan K. Joensen, skrivari í reiðarafelagnum, Pauli Dahl, yvirlækni, Dánjal J. Joensen, sjómansskúlastjóri og Hans A. Djurhuus, skipari.

Stovnandi aðalfundur av Havnar Bjargingarfelag varð hildin 21. februar, har 80 fólk vóru á fundi. Pauli Dahl var fundarstjóri. Í fyrstu nevndini komu Jákup í Jákupsstovu, Dánjal J. Joensen, Hans A. Djurhuus, Rubek Rubeksen, sum var skipari á Róki undir bjargingini av Goðanes og S E Jespersen, fjarritari, sum helst eisini hevur havt sín leiklut á Tórshavn Radio.

## Virðiligt minningarhald

Íslendsku gestirnir fóru aftur til Íslands við Norrønu mikudagin. Teir eru samdir um, at minningarhaldið fyri skiparan á Goðanes var virðiligt, og tey eru fegin um, at skiparin á Goðanes, Petur Hafstein, hevur fingið reist eitt minni í Føroyum.

Hetta minningarhald kann eisini sigast at vera ein góð ímynd av góðu viðurskiftunum millum føroyingar og íslendingar.